UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **6. mai 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-146**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-131/2020, frá Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmanni, eftir § 52 a í Tingskipanini, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er um heiðursskipan til útlendingar á mentanarøkinum og er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin umhugsað møguleikan at skipa soleiðis fyri, at tær almennu Føroyar kunnu veita útlendingum, ið stórliga hava stimbrað føroyskum ands- og mentanarlívi, onkran uppibornan heiður?

Svar

Landsstýrismaðurin er samdur í, at spurningur, um almennu Føroyar kunnu veita útlendingum, ið stórliga hava stimbrað føroyskum ands- og mentanarlívi, onkran uppibornan heiður, er bæði týdningarmikil og virðiligur.

Tað er altíð sera gleðiligt, tá eisini onnur enn føroyingar eru við til at økja um kunnleika til okkara ands- og mentanarlív, t.d. við at týða okkara bókmentir til onnur mál.

Einfalda svarið upp á spurningin er, at Føroyar kunnu sum er veita útlendingum heiður, og at hesin møguleiki eisini er brúktur. Eg kann nevna, at almennu Føroyar í 2006 heiðraðu íslendingin Jón Hilmar Magnússon fyri stórfingna arbeiðið hansara við íslendsk-føroysku orðabókini, sum kom út í 2005. Sigast skal tó, at møguleikin ikki er brúktur ofta - og møguliga ikki nóg ofta.

Heimild finst í lóggávuni um stuðul til mentan og list, ið heimilar landsstýrismanninum at veita serstaka heiðursgávu. Í § 9, stk. 3 í kunngerð um stuðul til mentan og list er tilskilað:

«Aðrar heiðursgávur kunnu eftir landsstýrismansins egnu avgerð latast listafólki, mentafólki ella felagsskapi».

Onki forðar fyri, at henda serstaka heiðursgáva verður latin til útlending.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður